sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyrisitingarstjóri: Kristjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen
Dagny Joensen
Jóstinus Eidesgaard
Eydun Klakkstein

Útgevari, uppseting og prent: P/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegi 26
Argjum

Postadr.: Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax: 14720

Marknasamráðing - jura og menniskju

Oddagrein

Í gjár fóru okkara fólk undir eitt nýtt umfar í samráðingunum við bretar um markið. Tað man nærkast ti 20. umfarinum og harvið eisini endanum á hesum drúgvu samráðingum. Tað er eisini okkurt, sum bendir á, at tolið hjá føroyingum er við at vera uppi, hóast samráðingarleiðarin ger greitt, at ein góð loysn er betri enn ein skjót loysn.

Í blaðnum í dag sigur føroyski samráðingarleiðarin, at tað kann henda seg, at tað verður neyðugt eftir hetta samráðingarumfarið at fara aftur til politikararnar við teimum boðum, at allir møguleikar eru trároyndir innan fyri núverandi heimildarkarm, og at tað skulu nýggjar og øðrvísi heimildir og boð til frá politikarunum, um haldast skal fram sum higartil.

TAÐ kann so eisini vera, at politiski myndugleikin kemur til ta niðurstøðu, at nú má og skal okkurt henda. Eingin ivi er um, at tað í løtuni fer fram eitt psykologiskt og taktiskt spæl, strið, har ikki minst bretar royna at fáa okkum í "fellunа".

MEN spurningurin er sjálvandi, hvat bretska stjórnin "pønsar" uppá. Er tað nakað í ti, sum verður ført frammi inni í blaðnum í dag av føroyingi, sum arbeiðir í Skotlandi, so kundi okkurt bent á, at bretska stjórnin er undir trýsti frá vinnuni, og tað kann føra til, at hon kanska longu eftir hetta umfarið fer at geva sínum fólkum nýggjar instruksir. Møguliga um at slaka fyri føroyska støðufestinum fyri harvið at gera stóru og sera týðandi oljuvinnuna í Bretlandi, sum ikki kann arbeiða við óvissuni, nøgda. Kanska tað fer at koma útspæl um eitt beinleiðis samarbeiði millum Føroyar og Bretland at menna alt økið millum londini.

VIT halda bretar vera ógvuliga órímuligar, um ein kann brúka slíka vending, tá teir krevja rættin til kanska júst tað økið, sum bestu møguleikar eru at finna olju føroysku megin miðlinjuna. Føroyar eru rabundus. Landið er fullkomiliga bundið at eini vinnu, sum í løtuni er á gravarbakkanum. Ein av fáu vónunum er júst møguleikin at finna olju, og er tað so, at henda oljan finst í júst ti økinum, sum bretar geva krav upp á, tá kann ikki sigast annað um bretska leiklutin í hesum máli, at hann er borin uppi av vanvirðing og fíggjindaskapi til føroyska grannan. Bretar siga, at her er talan um kalda jura og vísa frá sær, at slíkt hevur nakað við kenslur og menniskju at gera. Men tað er jú nettup hetta tað snýr seg um. Tað snýr seg um rættin hjá eini lítlari tjóð at lívbjarga sær við teimum fáu møguleikum, sum eru. Skal nú stóra fyrrverandi hjálandaveldið Bretland til at taka tað syndrið, sum er, frá føroyingum, tá má sigast at vera talan um ringt grannalag. Jú víst er talan um menniskju, harra Major.

Sosialurin

Orðaskifti

At stinga nøsina í tað privata vinnulívið?

Rolf Guttesen svarar Jógvani við Keldu

»Nú skal Framtaksgrunnurin stinga nøsina í tað privata vinnulívið í Føroyum«

Nakað soleiðis málbar Jógvan við Keldu seg í blaðnum (10.8.95), har hann talaði um »kommunistisering« av vinnulívinum. Hetta fekk meg ta at hugsa um tann munin, sum er millum eitt venturefelag og so teir gomlu grunnarnar. Venturefeløg seta partakapital í vinnufeløg, og hava ti rætt til at seta fólk í leiðsluna í mun til partakapitalin. Men annars sleppur tað »privata« at yvirtaka tær »kommunistiseraðu« fyritøkurnar, tá Framtaksgrunnurin hevur senerað, ruddað upp og fingið gongd á.

»Instituttet skal afhænde foretagne investeringer, når disse har vist sig levedygtige og salgbare« citat úr viðtøkunum §2, stk. 3. Soleiðis eigur tað at vera, og eingin grund er fyri at práta meira um hetta.

Men kanska gjørdi eg órætt móti teim »gomlu« grunnunum, ti mær vitandi *stungu teir eisini nøsina í privata vinnulívið*, tá kannast skuldi um ein verkætlan átti ella ikki átti at fáa stuðul úr grunninum. Munurin var heldur tann, at teir grunnarnir vanliga ikki settu fólk í stjórnina, ti her var talan um lán, og ikki partakapital. Vanlig bankalán áttu heldur ikki at verið givin uttan nágreiniligar kanningar av verkætlanunum.

Sjálvfylgiligheitir, kanska?

Hitt um at kapitalur skal geva profitt, sum helst skal vera størri enn bankarentan, eru *sjálvfylgiligheitir*, sigur Jógvan í svari sínum (5.9.95). Ja, so átti at verið.

Men veruleikin er bara tann, at allir pengar at kalla stóðu í bankunum, ti vinnulívið ikki gav nakran profitt, sum bara líktist bankarentuni. So okkurt hevur verið púra skeivt skrúvað saman. Hví var tað neyðugt, at triðingur ella fjórðingur av landsins fíggjarløg fór sum stuðul til fiskivinnuna? Gav hon profitt, samstundis sum hon fekk hundraðtals milliónir í stuðli um árið? *Var tað hetta, sum onkur kallaði privat kommunismu?*

Paradísið, har teir privatu tóku vinningin, meðan tað almenna (skattaborgarin) betalti undirskotið!

Privatkapitalisman fer at avtaka seg sjálva

Tó er eitt, sum Jógvan ikki hevur skilt enn. Munin millum *privat vinnulív*, sum hann helst málber seg, og so *kapitalismu*. Eg royndi at forklára, men tað hevur ikki rínið við.

Kapitalisman í okkara tíð verður minni og minni privat. Og hetta er galdandi bæði í USA, Týsklandi, Onglandi, Danmark og flest øðrum framkomnum londum.

Ein faktorur millum fleiri er tann, at flest øll faktfeløg og aðrir bólkar við, hava stovnað pensjónskassar, har milliónir av vanligum menniskjum betala túsund krónur ella meira inn um mánaðin. Og tilsamans gevur hetta eftir fáum árum nógvar milliardir. Hesin kapitalur skal ikki bert varðveita sítt virði ella fylgja við inflatiónini. Hann skal eisini forrentast, og helst geva meira enn bankarentu.

Hann skal í prinsippinum vígla og nørast! Og tað ger hann eisini í flestu førum. Tí verður kapitalisman minni og minni privat. Men tað ger einki, ti privatisman er als ikki neyðug!

Almenni sektorin og »privata« vinnulívið

Maður tvørheldur um, at almenni sektorin er alt ov stórur í Føroyum. Vinnulívið orkar ikki at bera ein ovurvaksnan almennan sektor.

Hetta er møguliga rætt, og eigur at umhugsast av teimum, sum skulu taka avgerðir! Sum prinsipp meini eg ikki, at almenn lønt eru sett uppá lívstíð. Spurningurin má vera, um tey gera samfelagsgagnligt og neyðugt arbeiði. Og hetta er ein *politisk avgerð!*

Men Jógvan er óklárur, tá hann tosar um hetta. Er tað kommunala umsitingin í Klaksvík, sum var ov stór? Er tað landsumsitingin? Hugsar hann eisini um skúlarnar, sjúkrahúsini og sosialforsorgina?

Men á hesum øki kann sparast, um politiskt dirvi er til tess. Ein vældokumenterað kanning, gjørd fyri fáum árum síðani, vísti, at tað almenna kundi spara **50 milliónir** um árið við einum nýggjum bygnaði (strukturi) innan sjúkrahúsverkið.

Har kanst tú spara, men tort tú at nerta við funktiónirnar hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi? Vís teg sum ein politikara, sum tort at taka ópopulerar avgerðir, um tú vilt spara.

Privata vinnulívið sum byrða hjá tí almenna

Ein orsøk til kreppuna var, at tað privata vinnulívið í fýrsunum bleiv eitt drepandi ok hjá tí almenna. Tey 10 árini upp til 1992 drenaði privata vinnulívið **3½ milliard** frá tí almenna.

Tá so tað almenna hoyknaði og ikki orkaði at betala meira, ja, so steðgaði tað privata vinnulívið upp, og liggur nú at kalla steindeytt. Og nú orkar hvørgin parturin at bera nakra byrðu!

Viðkomandi, óviðkomandi og tað sum er verri

So er tað mesta sagt, men Jógvan steðgar ikki á. Hann dregur Endurreisingarnevndina upp í og sigur, at *eg enntá var formaður* har. Eg kann bert siga, at nevndin sjálv valdi sín formann. Hann sigur ikki meira um nútíðina ella framtíðina, men grevur seg *aftur í trýssini og hálvfjersini*, og ákærir meg fyri at hava verið sosialist longu tá. Tað standi eg gjarna við, einki nýtt er í tí.

Tað nýggja er kanska, at tað eri eg enn!

Rolf Guttesen
20. september 1995

Verið við frá BINGO-byrjan!

Gloymið ikki haldaragjaldið